

# Karmar um eitt ljóst og livandi heim

GRANT






S. 8 **PLAST**
Vindeygu og hurðar

S. 20 **TRÆ OG TRÆ/ALU**
Vindeygu og hurðar

S. 34 **ALUMINIUM**
Vindeygu, hurðar og fasadur

S. 42 **RÁÐGEVING, TÆNASTA OG VIÐLÍKAHALD**

## FLEIRI ENN 50 ÁR Á BAKI

# FØROYSK DYGD

Verkstaðið á Vatnsoyrum lat upp í 1968. Í dag starvast 14 handverkarar á verkstøðunum á Vatnsoyrum og í Miðvági.

Flestu vindeygu og hurðar okkara verða framleidd á okkara egna verkstaði. Tað, sum vit ikki framleiða sjálvi, samla vit við hond, fuga sprossasamlingar ella eftirhyggja. Vit tryggja okkum, at eingir feilir eru.

Framleiðslan fevnir í dag um træ, plast og aluminium, umframt træ/alu. Upprunasniðini verða enn framleidd, men okkara úrval verður støðugt dagført eftir tørvi og ynski frá kundum okkara.









# PLAST

## Vindeygu og hurðar

Snøgt og serligt tillagað snið.
Lætt at halda og sera haldført.

Vit eru errin av at framleiða okkara væl umtóktu vindeygu og hurðar úr plasti, ið fáast í nógvum sniðum og litum.

***Snøgt, tíðarleyst og haldført.***



# VINDEYGU

### Álítandi dygd

Í Føroyum er neyðugt at hugsa væl um haldføri og dygd, tá ið vindeygu verða keypt. Tilfarið í okkara plastvindeygum er frá kendu týsku verksmiðjuni VEKA. Hongslini og læsingarnar á okkara vindeygum, munnu uttan iva vera tey sterkastu og haldførastu á marknaðinum. Tí kanst tú líta á vindeygu frá GRANT.

### Snið

At velja vindeygu til húsini er ein týdningarmikil avgerð. Tú vilt sjálvandi hava tað snið, sum klæðir tínum húsum best. Her er talan um eina heildarmeting av vindeygum og húsum. Støða skal eisini takast til, hvussu vindeygað skal latast upp, ella um tú vilt hava fastan karm.

### Orkusparandi glas

GRANT uppfyllir tíðarhóskandi krøv um bjálving og orkunýtslu. Øll okkara vindeygu verða framleidd við orkusparandi glasi við trimum løgum.
Til timburvindeygu ber til at velja glas við tveimum løgum.

### Alskyns litir

Tað hevur týdning at velja rættan lit til vindeyguni. Plastvindeygu verða framleidd í hvítum tilfari, sum hóskar til tað mesta. Vindeygu, hurðar og hurðafyllingar fáast tó eisini í øðrum litum, við at líma ein serliga haldføran litfilm á, ið heldur líka leingi sum vindeygað sjálvt.


Toppsving


Fastur karmur


Síðuhongt


Topphongt


Fleirvent


Sersnið

### Sprossar

Nógvir møguleikar eru við sprossum. Tá ið tú skalt gera av, hvussu nógvar sprossar tú vilt hava, og hvussu teir skulu setast í, er umráðandi at hugsa um heildarmyndina av húsunum. Eitt nú kann vera óheppið at seta ein sprossa, so at at hann er beint í eygnahædd, tí tá kann hann spilla útsýnið.

Vindeygu úr plasti fáast bæði við gjøgnumgangandi sprossum og álímaðum sprossum. Teir gjøgnumgangandi sprossarnir eru 64 mm ella 91 mm breiðir. Teir álímaðu sprossarnir eru 25 mm ella 45 mm breiðir.

## EYKA TILHOYR

### Ventilar

Vindeyguni kunnu framleiðast við ventilum í karminum. Hesir kunnu latast upp og aftur eftir tørvi. Er luftskiftið í húsunum gott, er vanliga óneyðugt at hava ventilar.

### Flugunet

Flugunet fæst til vindeygarammuna hjá teimum, sum tørvar tað, eitt nú matvøruvirkjum og matstovum, har tað er neyðugt at lufta út, men samstundis forða fyri, at smákykt og dust sleppur inn.

### Stormskinnarar

Vit selja stormskinnarar, ið verða festir uttan á vindeygakarmin. Skinnararnir eru sera hentir, um tær tørvar at seta plátur fyri vindeyguni, áðrenn illveðrið brestur á.

### Smyrjiolja og vindeygavask

Vit selja góða smyrjiolju til viðlíkahaldið av vindeygum og hurðum. Somuleiðis ber til at keypa vindeygavask til bæði plast, gummilistar og sjálvan rútin.





# HURÐAR

Vit framleiða bæði úthurðar og altanhurðar úr plasti. Einastu munirnir á altan- og úthurðunum eru læsingarnar og handtøkini. Tú hevur tú somu valmøguleikar innan altan- og úthurðar.

## Lætt viðlíkahald og sera haldført

HDYGD-plasthurðar frá GRANT krevja lítla og onga røkt. Plasthurðar hava roynst sera væl í Føroyum. Tær eru haldførar og krevja bert hendinga ferð, at hongslini verða smurd. Plasthurðarnar eru fevndar av 12 ára trygdini, sum vit veita øllum okkara viðskiftafólkum.

## Snið og lit eftir tínum ynski

HDYGD plasthurðar verða framleiddar júst í tí máti, sniði og liti, tú vilt hava, so tú fært júst ta røttu hurðina. Vit gera hurðar við ella uttan rút, og við ella uttan síðustykki. Latið okkum hoyra, hvat tú hugsar um. Send okkum t.d. eina mynd av eini hurð, sum tú hevur sæð onkustaðni, so gera vit tær eina tekning og geva tær eitt tilboð.

## Alskyns litir

Plast hurðar verða framleiddar í hvítum tilfari. Bæði hurðar og hurðafyllingar fáast í øðrum litum við at leggja ein haldføran litfilm á.

## Orkusparandi glas

GRANT uppfyllir tíðarhóskandi krøv um bjálving og orkunýtslu. Øll okkara vindeygu verða framleidd við orkusparandi glasi við trimum løgum. Til timburvindeygu ber til at velja glas við tveimum løgum.

## Handtøk

Á úthurðum eru handtøkini innan og uttan líka, tó verður læst við knarva innanfyri og við lykli uttan. Á altanhurðum er lykil í handtakinum innan og einfalt handtak, uttan lykil, á ytru síðuni.

# HURÐAR

## Dragihurðar

Okkara væl umtókta Premislide dragihurð er ein snotilig og smidlig flata millum millum tað, ið er uttandura og innandura. Tú fært tað besta útsýnið, tað lívgandi dagsljósið og eitt frískligt lot, tá tú hevur hug til tað. Samstundis er hurðin ein sterk og trygg verja móti harðbalnum veðri. Vit framleiða hurðina júst til tín tørv og í alskyns støddum.

## Dupult hurð

Um tú ynskir tær eitt størri op, ber til at seta tvær hurðar lið um lið. Tann eina hurðin fær vanligt handtak við sylindara (knarvi innan og lykil uttan) og hin hurðin hevur lásaskipan, sum er innbygd í karmin.

## Sprossar

Tú velur sjálv/ur um tú vilt hava sprossar. Sprossaslagið hevur stóran týdning fyri heildarmyndina av húsunum,. GRANT plasthurðar fáast bæði við gjøgnumgangandi sprossum og álímaðum sprossum. Gjøgnumgangandi sprossar eru 64 ella 91 mm, meðan teir álímaðu eru 25 ella 45 mm. Postarnir eru allir 90 mm.

## Høg ella lág karmgátt

Plasthurðarnar fást við høgari ella lágari karmgátt. Av tí at tær halda betur tætt móti vindi og regni, selja vit flest hurðar við høgari karmgátt.

Føroyska veðurlagið kann vera ein stór avbjóðing, um hurðin hevur lága gátt. Hetta er serliga galdandi, um hurðin stendur ábært fyri vind og regn. Um hurðin stendur, har tað vanliga er lívd, ella t.d. har koyristólar vanliga koyra, kann lága gáttin vera betra valið.

Hægru karmgáttirnar eru 7,5 cm og lægru eru 2 cm høgar.



Gjøgnumskurður
av høgari gátt



Gjøgnumskurður
av lágari gátt

Henda dragihurð er bæði snøgg og haldfør.



# KARMAR UM EITT LJÓST OG LIVANDI HEIM




LÆTTI-
MJÓLK



# TRÆ & TRÆ/ALU

## Vindeygu og hurðar

Vit eru errin av at framleiða dygdargóð vindeygu og altanhurðar úr timbri.

Bæði vindeygu og hurðar hava nógvar góðar eginleikar. Tey eru snøgg, tíðarleys og sera haldfør. Fáast í nógvum sniðum og litum.

***Føroyski klassikarin***

# VINDEYGU

## Klassikarin er træ

H-vindeygað úr træi er okkara klassikari. Í meiri enn hálva øld hava vit framleitt og ment okkara vælkenda og haldføra træ-vindeyga, sum eisini verður kallað 'Husmor vindeygað'.

Vindeyguni hava staðið sína roynd í húsum um allar Føroyar og fáast í nógvum sniðum, øllum litum og við orkusparandi glasi.



### Nýklassikarin er okkara træ/alu

Í mun til trævindeygað er allur karmurin á træ/alu-vindeyganum klæddur við aluminium, fyri at verja viðin fyri regni og sól. Tað merkir, at lítið og einki viðlíkahald skal til.

Vilt tú hava vakrar og hugnaligar trærammur innan, men vilt sleppa undan viðlíkahaldinum uttan, er træ/alu-vindeygað rætta valið hjá tær.

Aluklædningurin fæst í øllum litum.



# VINDEYGU

### Orkusparandi glas

GRANT uppfyllir øll tíðarhóskandi krøv um bjálving og orkunýtslu. Øll vindeygu eru framleidd við orkusparandi glasi við trimum løgum. TIl timburvindeygu kann glas við tveimum løgum veljast.

### Liðugmálað vindeygu

Nógv tíð og orka er at spara við at keypa vindeygu, ið eru málað frammanundan. Vit sproyta málingina á, tá ið timbrið er tilevnað, men áðrenn listar, glas og annað verður sett í.
Tí er alt málað, sum málast skal og einki, sum ikki skal málast. Harumframt er grundarin soppadrepandi, og tað leingir livitíðina hjá vindeyganum.

### Alskyns litir

Liturin tú velur til vindeygu og hurðar, hevur stóran týdning fyri heildarmyndina av húsunum.
Tú kanst sjálv/ur velja litin, ið tú heldur hóska best til tíni hús. Tað ber til at hava ein lit uttan og ein annan innan.

### Kjarnuviður og rotviðgerð

Av tí at vit hava so drúgvar royndir við føroyska veðurlagnum, brúka vit kjarnuvið, sum vit eisini rotviðgera. Viðgerðin, sum vit gera, leingir munandi um okkara trævindeyga, í mun til líknandi, innflutt vindeygu. Okkara trævindeygu eru gjørd úr 65 til 70% kjarnuviði, sum hevur natúrliga rotviðgerð. Vit leggja viðin í rotviðgerðarløg, sum hann sýgur í seg, inntil hann hevur minst 5 mm undir yvirflatuni og minst 5 cm í endunum. Henda viðgerð forðar fyri, at rotið byrjar beinanvegin, um málingin slítist av, ella vindeygað fær eitt skursl.

### Snið

Vindeygavalið er ein týdningarmikil avgerð. Sjálvandi vilt tú hava eitt snið, sum klæðir tínum húsum best. Í heildarmetingini skalt tú eisini hugsa um, hvussu vindeygað skal latast upp, ella um tað skal hava fastan karm. H-vindeyguni verða framleidd bæði til at lata upp og við føstum karmi, bæði í træ og træ/alu.


Toppsving


Fastur karmur


Síðuhongt


Topphongt


Fleirvent


Sersnið









# VINDEYGU

### Sprossar og postar

Um tú vilt býta vindeygað upp í smærri eindir, ber til at seta sprossar ella postar í. Tað er umráðandi at hugsa um heildarmyndina av húsunum, tá ið tú gert av, um tú vilt hava sprossar ella postar, og hvar og hvussu nógv skal vera av tí. Hugsa teg væl um, so at sprossi ikki er beint í eygnahædd og soleiðis oyðileggur tær útsýnið. Sprossar hóska væl til eldri hús ella hús í gomlum stíli.

Vindeyguni eru uppbygd so, at karmurin er uttast. Vindeygu, sum ikki kunnu latast upp, kalla vit vindeygu við føstum karmi. Tað ber til at seta loddrættar ella vatnrættar postar í karmin fyri at styrkja vindeygað. Postarnir kunnu vera 68 ella 78 mm breiðir.

Til vindeygu, ið skulu kunna latast upp, seta vit eina rammu í karmin. Í rammuna kunnu sprossar eisini setast., sum antin kunnu vera gjøgnumgangandi ella klipsaðir á. Gjøgnumgangandi sprossar eru 47 og 68 mm breiðir og teir, ið vera klipsaðir á, eru 28, 45 og 65 mm.

# EYKA TILHOYR

### Ventilar

Vindeyguni kunnu framleiðast við ventilum í karminum. Hesir kunnu latast upp og aftur eftir tørvi. Er luftskiftið í húsunum gott, er vanliga óneyðugt at hava ventilar.

### Flugunet

Flugunet fæst til vindeygarammuna hjá teimum, sum tørvar tað, eitt nú matvøruvirkjum og matstovum, har tað er neyðugt at lufta út, men samstundis forða fyri, at smákykt og dust sleppur inn.

### Stormskinnarar

Vit selja stormskinnarar, ið verða festir uttan á vindeygakarmin. Skinnararnir eru sera hentir, um tær tørvar at seta plátur fyri vindeyguni, áðrenn illveðrið brestur á.

### Smyrjiolja og vindeygavask

Vit selja góða smyrjiolju til viðlíkahaldið av vindeygum og hurðum. Somuleiðis ber til at keypa vindeygavask til bæði plast, gummilistar og sjálvan rútin.

# ALTANHURÐAR

Vit framleiða dygdargóðar altanhurðar úr timbri. Hesar verða framleiddar, viðgjørdar og málaðar eftir somu neyvu forskriftum sum timburvindeyguni.
Tilfarið er fyrsta floks laminerað fura. Tær eru vakrar og halda leingi.

### Snið eftir tínum ynski

Møguleikarnir eru at kalla teir somu sum fyri vindeyguni. Tú fært tað snið og tann lit tú vilt hava. Við ella uttan sprossar, málaðar ella ómálaðar frá verkstaðnum og tú kanst velja millum ymisk sløg av glasi.
Aluklædningur kann setast á útsíðuna á altanhurðum.

### Alskyns litir

Tú fært hurðina í júst tí liti, sum tú heldur hóska best til tíni hús.
Tað ber eisini til at hava ein lit uttaná og ein annan innan.

### Orkusparandi glas

Vit uppfylla øll tíðarhóskandi krøv um bjálving og orkunýtslu. Altanhurðarnar verða framleiddar við orkusparandi glasi við tveimum løgum, men glas við trimum løgum, sum bjálvar enn betur, kann eisini veljast.

### Hongsl og handtøk

Altanhurðar ganga altíð út. Tær hava handtøk bæði innan og uttan.
Hurðarnar verða læstar við knarva, sum situr í lásinum innan.
Hurðin kann setast opin júst har tú vilt.

### Møguleikarnir eru fleiri

Lat okkum hoyra, hvat tú ynskir, so finna vit eina loysn saman.



# HÁGÓÐSKU SKIPANIR TIL EINKULT VINDEYGU OG HEILAR FRAMSÍÐUR







# ALUMINIUM

## Vindeygu, hurðar og fasadur

Vit gera flestu modernaðu húsafasadur á virkisbygningum í Føroyum í dag. Støðugt fleiri privat velja eisini okkara tilfar til síni hús. Vit hava serkøn fólk til ísetan. Tú skalt bara velja tilfar, lit og siga hvussu útsjóndin skal vera. Vit framleiða, koyra út og seta upp.

***Bert hugflogið setur mørkini***

# ALUMINIUM

GRANT framleiðir bæði vindeygu, hurðar og heilar húsafasadur úr aluminium. Hetta er sterkt, lætt, snøgt og viðlíkahaldsfrítt tilfar. Bæði privathús, skrivstovu- og virkisbygningar nýta meiri og meiri aluminiumsfasadur.

Tilfarið er ikki bara sterkt og álítandi. Vindeygu, hurðar og fasadur frá okkum krevja sera lítið viðlíkahald - og tilfarið heldur alt lívið.

### Glasfasadur og inniveggir

Aluminium-skipanir til einkult vindeygu og/ella heilar framsíður er sterkasta og haldførasta loysnin til føroyska veðurlagið, eisini um ynskini eru samansett og krøvini høg.

Glasfasadur hava verið ein stórur partur av okkara virksemi í seinastuni. Vit hava gjørt nógvar uppgávur og kunnu nevna Varðin Pelagic á Tvøroyri, Bank Nordik í Tórshavn, Tórsvøllur í Gundadali og nýggja ítróttarhúsið í Fuglafirði/ Fuglafjarðar kommunu.



# HURÐAR

Vit framleiða úthurðar út aluminium júst til tín tørv. Tú ert ikki bundin av standardmátum. Latið okkum frætta frá tær, hvat tær tørvar, so finna vit røttu loysnina saman.

### Lætt viðlíkahald og sera haldfør

Hurðarnar eru sera sterkar og snotiligar og hava modulskipan, ið gevur nógvar sniðmøguleikar. Hurðaskipanirnar eru væl bjálvaðar og standa seg væl móti innbroti. Tær eru næstan heilt viðlíkahaldsleysar. Aluminiums-hurðar kunnu bæði nýtast til vanlig sethús og til størri hurðaskipanir í stórum bygningum.

### Alskyns snið og litir

Hurðarnar verða framleiddar júst í tí máti, sniði og liti, sum tú vilt hava, so tú altíð fært ta røttu hurðina. Hurðarnar kunnu vera við ella uttan síðustykki og við ella uttan rút. Vit vilja fegin hoyra tykkara uppskot.

### Sjálvvirkandi hurðar

Vit hava at kalla allar loysnir við sjálvvirkandi hurðum. Vit hava drúgvar royndir við karusell-hurðum, dragihurðum og sjálvvirkandi loysnum til vanligar hurðar. Vit samstarva við fleiri av kendastu veitarunum sum Geze, Tormax og Dorma.




Bilskaðadepil
Móttøka

# ALUMINIUM ER STERKASTA OG HALDFØRASTA LOYSNIN TIL FØROYSKA VEÐURLAGIÐ




Nº 12

# FASADUR

Aluminiumskipanir til einstøk vindeygu ella til heilar framsíður eru sterkasta og haldførasta loysnin til føroyska veðurlagið - eisini tá ið ynskini eru samansett og krøvini høg.

### Møguleikar

Aluminium skipanir gera, at tað ber til at byggja størri og meiri samansett enn tá ið vanlig vindeygu úr plasti ella viði verða nýtt. Glas, sum bygningslutur, gerst alsamt meiri spennandi og tí er aluminium ein alsamt meiri viðkomandi loysn, bæði til stórar bygningar og sethús.

### Sera góðir bjálvingareginleikar

Aluminium er ment sera nógv og vit veita í dag skipanir við sera góðum bjálvingareginleikum, ið tryggja lægst møguliga orkunýtslu.





# ÚTISTOVA, HAVASTOVA ELLA VAKSTRARHÚS

Heitini eru nógv og tað eru møguleikarnir eisini. Vilt tú vera nærri náttúruni bæði á vetri og sumri, er hetta ein góð loysn til tín. Vit framleiða snøggar og sterkar útistovur sum hesa úr aluminiumi og glasi.
Útihús kunnu standa fyri seg ella byggjast upp í verandi hús. Sig okkum, hvat tú droymir um, so fremja vit dreymin í verki.

Vit standa við okkara vørur og veita 12 ára garanti fyri útistovur, havastovur og vakstrarhús.

# VIT FYLGJA TÆR FRÁ HUGSKOTI OG DREYMUM, TIL FRAMLEIÐSLU OG UPPSETAN




GRANT
RANT


GRANT
GRANT

# RÁÐGEVING, TÆNASTA OG VIÐLÍKAHALD

Vit bjóða okkum fram at ráðgeva um møguleikar, tekna uppskot og geva óbindandi tilboð. Tekur tú av einum tilboði, koma vit á staðið at eftirkanna mátini og tryggja, at rætt verður bílagt.

Á heimasíðu okkara ***grant.fo/tilboð*** kanst tú senda okkum kunning um vøru, mát og aðrar smálutir, og so venda vit aftur til tín við einum óbindandi tilboði.

Tú ert altíð vælkomin at ringja ella skriva til okkara:

**TLF.: 355 000**
**GRANT@GRANT.FO**

Tú finnur meira kunning og ráð á grant.fo ella skanna kotuna.

# ÁÐRENN TÚ BÍLEGGUR

## Tak rætt mát

Tað er av stórum týdningi at taka rætt mát, so at einki er at misskilja. Breidd og hædd mugu altíð mátast uttan á karminum. Karmmátið er longsta mátið á karminum.

Holmátið er støddin á holinum, í vegginum, har vindeygað ella hurðin skal í. Mátið verður uppgivið í heilum tølum. Vindeygu eru vanliga 12 mm minni enn holmátini.

*Dømi: Karmmát 988 x 1188 mm gevur holmát, sum eitur 1000 x 1200.*

***Gevið gætur:***
***Øll mátini verða givin í breidd x hædd.***




**Hol**

Holmát er støddin á holinum í vegginum, har vindeyga ella hurð skal í.

**Karmur**

Tann parturin av vindeyganum, sum ikki kann latast upp.

**Ramma**

Tann parturin av vindeyganum, sum kann latast upp.

**Sprossar**

Uppbýting av rútinum í rammuni. Gjøgnumgangandi ella klipssprossar.

**Postar**

Uppbýting av karminum – skilja fasta partin frá rammuni ella skilja tvær rammur.

### Hurðar og vindeygu ganga

Tá ið skiljast skal millum **»høgra«** og **»vinstra«**, skal altíð lesast frá síðuni, har hongslini sita.

Gongur vindeygað ella hurðin út, skal avlesast uttanífrá.
Gongur vindeygað ella hurðin inn, skal avlesast innanífrá.

*Vit viðmæla at gera eina einfalda tekning, sum dømi niðanfyri.*




# Uppmáting og tryggleiki

Tá ið biðið verður um tilboð er nóg mikið at hava tikið nøkulunda mát. Vit kunnu koma at máta fyri teg. Goldið verður fyri, alt eftir hvussu nógvar uppmátingar skulu gerast.

Tá ið tú hevur fingið tilboð og vilt taka av, koma vit út at kanna mátini. Soleiðis kanst tú kenna teg trygga/n um, at bæði vindeygu og hurðar verða bíløgd í rættari stødd.

# GLAS

GRANT uppfyllir øll tíðarhóskandi krøv um bjálving og orkunýtslu.
Øll okkara vindeygu eru úr orkusparandi glasi við trimum løgum.
Til timburvindeygu ber til at velja glas við tveimum løgum.

## Ymisk yvirflata

Har tað ikki skal síggjast inn, t.d. í vesivindeygum, nýta vit ymiskt ráglas. Hetta ger, at tað ikki sæst inn, men ljós sleppur kortini inn. Niðanfyri eru dømi um ymisk sløg av ráglasi.


Oceanic 528


Abstrakt


Kura


Spegltráglas


Mattráglas


Pelz


Etza



## Ljóðdoyvandi glas

Ljóðdoyvandi glas brýtur og doyvir ljóðbylgjur við at nýta glas, ið hevur ymiska tjúkd á innara og ytra glasinum. Býrt tú við høvuðsveg, ella har annað óljóð er, er hetta kanska rætta loysnin til tín.



## Trygdarglas

Trygdarglas hevur somu brotstyrki sum vanligt glas, men hongur saman við lími, so at tú ikki skert teg av tí - júst sum bilrútar. Trygdarglas kann eisini gerast úr herdum glasi, ið hevur stóra brotstyrki. Trygdarglas hóskar væl til vindeygu ella hurðar, har rúturin røkkur heilt niður á gólv, ella har ábært er fyri illveður og líknandi.

## Sóltálmandi glas

Sóltálmandi glas kastar antin sólstrálurnar frá sær ella tekur tær í seg. Glasið fæst í ymiskum stigum og styrkjum. Har sólin stendur á, kann tað skjótt gerast ov heitt og ov ljóst inni, bæði fyri fólk og innbúgv.



# ALT OKKARA GLAS UPPFYLLIR TÍÐARHÓSKANDI KRØV UM BJÁLVING OG ORKUNÝTSLU





# LITIR

Liturin tú velur til vindeygu og hurðar, hevur stóran týdning fyri heildarmyndina av húsunum.

Tú kanst fáa tann lit, tú sjálv/ur heldur hóskar best til júst tíni hús. Tað ber til at fáa ein lit innan og ein annan uttan.



RAL 9010
*(Vanligasti liturin)*

RAL 9016
*(Grund liturin, plast )*

Okkara sølufólk hava royndir í at seta litir saman.

Lat okkum ráðføra teg um tínar møguleikar og litaval.



# ALSKYNS SNIÐ

Vit kunnu veita so gott sum alt.
Set teg í samband við okkum, so finna vit eina loysn saman.



# VIÐLÍKAHALD

Onki er fullkomiliga viðlíkahaldsfrítt. Sama um tíni vindeygu ella hurðar eru av træ, plasti ella aluminium, so er gott at hyggja nærri at teimum viðhvørt.

### Eykalutir og garanti

Okkara vindeygu og hurðar eru sera slitsterk og haldfør. Men hóast tey eru kend fyri sítt haldføri, kunnu slitlutir og annað kortini fara. Hetta hava vit hugsað um, og hava eykalutir á goymslu. Tí tryggja vit okkum, at tíni vindeygu og hurðar frá GRANT halda enn betur. Um tú boðar frá einum trupulleika, sum er fevndur av okkara garantii, verður sjálvanid umvælt uttan kostað.
Les meiri á *Grant.fo/garanti*

# GÓÐ RÁÐ OG VEGLEIÐINGAR

Á heimasíðu okkara fært tú vegleiðingar og góð ráð til viðlíkahald.

### Fylg vegleiðingunum

Skanna kotuna ella far inna á **Grant.fo/vidlikahald**



# VIT SNIÐGEVA OG FRAMLEIÐA TIL TÍNI YNSKI OG DREYMAR




GRANT

FØROYSK DYGD

# 12 ÁRA GARANTI!

## FLEIRI ENN 50 ÁR Á BAKI

Okkara vørur hava staðið sína roynd í húsum um allar Føroyar. Tí veita vit tær eitt longri garanti, enn tú skalt vænta tær at fáa aðrastaðni. Vit kýta okkum hvønn dag at framleiða álítandi vørur og at veita stinna tænastu. Tí hava vit so nógvar nøgdar kundar kring alt landið.

Set teg í samband við okkum


**GRANT.FO**

**355 000**

**GRANT@GRANT.FO**

GRANT

í Geilini 2, 385 Vatnsoyrar, Føroyar


GRANT - marts 2024